# Dygd heldur enn lágan prís




**Fyritøkan P/f Leif Mohr varð stovnað av Leif Mohr 15. juli 1935, tá hann við eini lýsing í Dimmalætting boðaði frá, at hann var farin undir egið installatiónsvirki og gjørdi alt elektriskt arbeiði »gott, skjótt og bíligt«. og var hann stjóri, til hann doyði í 1978**

LM Handilin selur flatskermar, myndatól, køliskáp o.m.a til vanliga húsarhaldið, LM Veiting er heildarveitari av el-tilfari og hevur deildir í Havn og á Kambsdali, LM Stórkøkar veitir køksútbúnað til størri og smærri køkar bæði á landi og umborð á skipum, LM Electric er størsta el-fyritøkan í Føroyum og ger størri el-innleggingar o.a. og VIKA Industry, sum er nýggjasta liðið í samtakinum, loysir alskyns uppgávur, sum t.d viðlíkahald av øllum typum og merkjum av motorum, pumpum og kompressarum.

Tað er í stuttum tað, sum kann sigast um fyritøkuna anno 2009, ið fyri 64 árum síðani – í 1935 – byrjaði sum ein Havna-fyritøka, og nú er vorðin meira national, men eldri fólk minnast enn Leif Mohr sjálvan, og tey eru góð við fyritøkuna, sum Jarnold Nattestad, søluleiðari tekur til, og í dag hevur P/f Leif Mohr eini 80 fólk í starvi, har summi eru virkin í fleiri deildum

Tað byrjaði við einum verkstaði í einum kjallara í Steinagøtu, men við árunum hevur virksemið fleiri ferðir vaksið seg so stórt, at neyðugt hevur verið at flutt í størri og betri høli á Smyrilsvegi umframt at ein LM Handil er á Kambsdali. Fyritøkan hevur fylgt við stóru menningini seinnu árini og tikið tey stig, ið hava verið neyðug.

## Leggja dent á dygdina

Eitt, sum eyðkennir fyritøkuna, er dygdin. Tað er sera umráðandi at vørurnar, tænasturnar, innleggingarnar og viðlíkahaldið eru væl úr hondum greidd. Og er tað av størri týdningi enn at kappast við aðrar um prísin. Tí er kanska onkur, sum velur ikki at fara til LM-fyritøkuna við ørindi sínum. Men tað fær ikki fyritøkuna at víkja frá grundreglu síni.

Vanligi brúkarin kennir mest til LM-Handilin og er hann veitari til nógvar køkar, grovkøkar og stovur í føroyskum heimum. Merkini, sum teir selja, eru tey kendu B&O, Sony, sum nokk er størsta merki hjá LM, AskoVølund, Gram, VossElectrolux og so tey nýggju Smeg og Fisher& Paykel. Á heimasíðuni lm.fo skriva tey m.a.:

Dygd og livitíð hava altíð verið grundleggjandi krøvini, vit hava sett fyri at veita eina so góða tænastu sum gjørligt til tann føroyska marknaðin. Í dag kunnu vit framvegis veita vørur við hesum dygdum.

Tað eru kanska ikki øll, sum vita, at tann fyrsta fyritøkan Bang & Olufsen útflutti til, var til P/f Leif Mohr. Tað var í 1938, og av tí at kríggið brast á stutt eftir og einki samband var millum Føroyar og Danmark, fekk Leif Mohr ikki goldið rokningina. Men so skjótt kríggið var av, fór hann sjálvur niður við eini tasku av pengum og bankaði uppá hjá B&O at gjalda fyri vøruna. Tá hevði danska fyritøkan fyri langari tíð síðani avskrivað skuldina, so tey vóru rættiliga ovfarin. Tann dag í dag hevur P/f Leif Mohr av tí sama eina stóra stjørnu hjá Bang & Olufsen.










